# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Amerikanska fólkið og herleiðararnir eru ímóti ætlanunum hjá Bush, men hann letst sum einki*

*Nancy Pelosi og Harry Reid)*

# Bush: – Lat ætlan mína fáa ein kjans

**Kríggið ímóti yvirgangi og veðurlagsbroytingar vóru høvuðsevnini í sættu røðuni hjá George W. Bush fyri amerikanska fólkinum**



*Hetta var sættu ferð, at Bush helt røðu fyri amerikanska fólkinum*

– Høvdu vit tikið okkara hermenn úr Irak nú, hevði tað fingið stórar og víðfevndar avleiðingar. Tí hava vit valt bara ein møguleika, og tað er at senda uppaftur fleiri hermenn til Irak.

– Tað kósina hava vit valt, og tit mugu geva henni ein kjans, segði forsetin í einari beinleiðis áheitan á ta demokratisku andstøðuna teir nógvu amerikanararnar, sum halda, at forsetin er á skeivari kós. Sambært teimum seinastu kanningunum halda 71 prosent av amerikanarunum, og USA er á skeivari kós. Bara 33 prosent taka undir við forsetanum.

Einki bendir á, at demokratarnir hava hug at geva forsetanum nakran kjans. Í einari felags kunngerð í nátt søgdu leiðarin í Umboðsmannatinginum, Nancy Pelosi, og leiðarin í Senatinum, Harry Reid, at forsetin lurtar als ikki eftir tí, sum amerikanska fólkið sigur.

– Ein ovurstórur meiriluti av amerikanska fólkinum, hernaðarligir leiðarar og politikarar í báðum flokkum eru ímóti ætlan forsetans um at herða kríggið í Irak. Men forsetin letst sum einki, søgdu tey bæði í kunngerðini.

### Veðurlagið

Í røðuni gjørdi George W. Bush eisini nógv burtur úr veðurlagsbroytingunum, sum hann segði vera eina stóra avbjóðing. Hann segði, at USA er alt ov heft at olju úr øðrum londum. Tí noyðist USA at leggja størri dent á varandi orkukeldur, og tí fer stjórnin at biðja Kongressina um pengar til at kanna møgulerikarnar fyri at leggja um til varandi orkukeldur.

Hann segði, at amerikanarar brúka alt ov nógv bensin, og at bensinnýtslan skal skerjast 20 prosent tey næstu 10 árini. Ístaðin fyri skulu bilarnir brúka onnur brennievni.

# Forseti fyri ríkisrætt



*Moshe Katsav noktar seg sekan*

**Ísraelski forsetin, Moshe Katsav, skal fyri ein ríkisrætt, ákærdur fyri kynsligan ágang ímóti fleiri kvinnum**

Nógvir ísraelskir politikarar halda, at forsetin átti at lagt frá sær, tá hann fekk at vita, at ríkisákærin umhugsaði at stevna honum fyri kynsligan ágang. Tað vildi Moshe Katsav ikki, og tí skal hann nú fyri ein ríkisrætt.

Í morgun ljóðaði, at Moshe Katsav møguliga fór at siga seg frá í dag, men aðrar keldur hildu, at hann kanska fór at taka farloyvi frá forsetaembætinum eina tíð.

Tann 61 ára gamli forsetin heldur uppá, at hann er ósekur, hóast fleiri av hansara fyrrverandi medarbeiðarum hava lagt hann undir kynsligan ágang.

Politiskt hevur forsetaembætið í Ísrael lítlan og ongan týdning, og gølan fer tí neyvan at fáa nakra ávirkan á stjórnina hjá Ehud Olmert, forsætisráðharra. Ísraelsku fjølmiðlarnir siga, at hinvegin fer gølan uttan iva at styrkja ta vanligu ísraelsku uppfatanina av, at alt ruggar ikki rætt í ovastu leiðsluni. Teir vísa á, at Olmert sjálvur er undir illgruna fyri svik.

Moshe Katsav hevur verið forseti síðani í 2000, og skeiðið rennur út í summar.

## STUTT SAGT

### Fjaldar mikrofonir

Alt bendir á, at onkur hevur lurtað eftir tí, sum er farið fram á skrivstovuni hjá vinstrasinnaða týska politikaranum Wolfgang Neskovic. Í hvussu er hevur løgreglan funnið tvær mikrofonir, sum onkur hevði fjalt í tveimum lampum á skrivstovu hansara. Wolfgang Neskovic er limur í tí sosialistiska Vinstraflokkinum og er kendur fyri sínar hvøssu atfinningar at framferðini hjá týsku fregnartænastuni í sambandi við yvirgang. DPA skrivar úr Berlin, at týskir politikarar eru í øðini um avlurtingina.

### Tók seg aftur

Umhvørvisstríðsmaðurin Nicolas Hulot ætlaði sær at stilla upp til franska forsetavalið í apríl, men í gjár boðaði hann frá, at hann fer ikki at stilla upp kortini. Um ársskiftið vísti ein meiningakanning, at ellivu prosent av veljarunum ætlaðu sær at atkvøða fyri Nicolas Hulot, um hann stillaði upp. Í november í fjør kunngjørdi Hulot eina drúgva frágreiðing um, hvussu vit kunnu varðveita lívið á Jørðini, og síðani hava fleiri av teimum fremstu politikarunum í Fraklandi sagt seg taka undir við honum. Millum teirra eru tey bæði forsetavalevnini, Ségoléne Royal og Nicolas Sarkozy.

### Russar sálarsjúkir

Óttin fyri yvirgangi og búskaparkreppu í Russlandi ger, at 40 prosent av russiska fólkinum líða av sálarligum trupulleikum. Tað vísir ein nýggj kanning. Tey, sum hava gjørt kanningina, siga, at talið á russum, sum hava sálarligar trupulleikar, er trífaldað tey seinastu 10-15 árini. Tey almennu hagtølini vísa eisini, at á hvørjum ári taka umleið 60.000 russar lívið av sær.